planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo




# Hamferð:

# - Høvdu als ikki roknað við at vunnið

Marin Eidesgaard
Sigurbjørg Fríða Nielsen
Praktikantar

Vit høvdu eitt prát við John Egholm, sum er limur í bólkinum Hamferð. Hamferð vann síðsta leygarkvøld kappingina, sum Sement skipaði fyri. Nummar tvey vórðu Dánial og Bjarki, og Lyon Hansen kom inn á triðja plássið.

**Hvat kalla tit sjangruna, sum bólkurin spælir?**
- Sjangran, sum vit spæla, kalla vit fyri Doom Metal. Tað er eitt slag av heavy, sum leggur meira dent á seint tempo og eina meira óhugnaliga, ella sorgabundna atmosferu.

**Hvussu nógvir limir eru tit í bólkinum?**
- Vanliga eru vit seks limir, men nakrir búgva uttanlands, í Svøríki og Danmørk. Tó er tað ikki ein trupulleiki, og allir limirnir vera aftur í summar.

**Hvønn leiklut hava teir ymisku limirnir?**
- Eg gangi út frá, at allir taka sær av ymiskum. John Hansen, sangarin í bólkinum